# Alexandur Kristiansen heiðraður

**Skaldið úr Fuglafirði fær í dag handaða Barnamentanarvirðis lønina hjá Skúlabókasavnsfelagnum**

VIRÐISLØN
*Eirikur Lindenskov*



*Alexandur Kristiansen, skald og lærari í Fuglafirði, er her avmyndaður á lendingini á Kirkju. Hann fær í dag handaða Barnamentanarvirðislønina hjá Skúlabókasavnsfelagnum*
*Mynd: EirikurLindenskov*

Leygardagin 16. mars fær Alexandur Kristiansen, lærari og skald úr Fuglafirði, handaða Barnamentanarvirðislønina hjá Skúlabókasavnsfelagnum.

»Skúlabókasavnsfelagið letur í einstøkum førum virðisløn fyri barnamentanarligt arbeiði. Hon er ætlað felagsskapum og persónum, sum á ymiskan hátt hava arbeitt fyri og stuðlað føroyskari barnamentan.«

Alexandur Kristiansen hevur á dygdargóðan hátt stuðlað føroyskari barnamentan gjøgnum nógv ár. Hann fær virðislønina fyri við sínum fjølbroyttu barnayrkingum at vekja og menna hugin hjá føroyskum børnum fyri sangi og yrkingum.

Barnayrkingarnar hjá Alexanduri lýsa av lívsgleði – gleði yvir at liva, gleði yvir at spæla við orðunum. Orðamyndirnar eru stuttligar og originalar, og børnunum dámar tekstirnar væl.

Barnamentanarvirðislønin varð stovnað av Skúlabókasavnsfelagnum í 1985, og hon hevur verið handað 5 ferðir: í 1985 til Pedagogfelagið, í 1987 til Havnar Sjónleikafelag, í 1989 til Barnabókaklubban hjá Bókadeildini, í 1995 til Ingrið Sondum, Bjørg Matras og Jóhannes Enni og í 1999 til Vilhelminu Larsen í Dali.

Virðislønin er ein plakat, áseymað mynd, sum listakvinnan Astrid Andreassen gjørdi í 1983.

# Nýggj fløga við Jógvan Jón



*Jógvan Jón Petersen hevur gjørt orð og løg á fløguni við fólksligum fosturlandssagnum, sum Fegnir gevir út*

FLØGUÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Kærleiki millum menniskju og til fosturlandið eru høvuðsevnini á spildurnýggjari fløgu, sum kom út saman við Fregnum í gjár. Á fløguni eru fýra løtt løg, ið benda á tað fólksliga.

Tað er sandingurin, Jógvan Jón Petersen, sum hevur tikið stig til fløguútgávuna og hevur lagt hana til rættis við peningaligum stuðli frá nógvum feløgum og stovnum.

Fløgan kann ikki keypast í handlum, men fæst einans saman við blaðnum í blaðbúðunum – og Fregnir er ikki dýrari av teirri orsøk, blaðið kostar enn sum áður 20 krónur at keypa.

Umframt Jógvan Jón Petersen, sum spennir seg út sum sangara, eru nógvir aðrir kendir tónleikarar við á fløguni. Teir eru Ronnie Nielsen, Kim Hansen, Torbjørn Jensen, Malan Thomsen og James Olsen sum syngja, Finnur Hansen við ljómborði, Niclas Johansen við elgittara og Jan Zachariassen, sum spælir onnur ljóðføri og hevur forritað og ljóðblandað tónleikin á fløguni.

Á fløguni, sum eitur »Byggið land« eru fýra løtt løg. Í sanginum »Løtur vit eiga« syngur Jógvan Jón um ein, ið minnist aftur á unnustu sína og tokkan teirra millum. »Byggið land« er ein sannur tjóðskaparsangur við móðurlandinum, Føroyum, í miðdeplinum. Tað eru teir báðir, Ronnie Nielsen og Kim Hansen, ið syngja hendan nemandi fosturlandssang. »Ítróttarrómur« verður kanska ein nýggj landaplága í sambandi við ítróttartiltøk og stevnur. Tað er James Olsen, sum syngur hendan sera lívliga sangin. Seinasta lagið snýr seg um løtuna, tá ið dagurin byrjar. Tað er Malan Thomsen, sum syngur »Góðan morgun«. Við reinu rødd síni biður hon okkum skúgva dapurskygni til viks og møta degnum við uppbrotnum ermum og einum brosi.

# Rendi á land í Vágum




**Danska farmaskipið Klevstrand rendi fríggjanáttina á land norðanvert Fútaklett. Skipið slapp sjálvt av aftur fríggjamorgunin**

LANDGONGD
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Klevstrand sigldi á land um midnáttarleitið hóskvøldið og varð standandi alla náttina. Um hálvgum níggju tíðina fríggjamorgunin flotnaði skipið av aftur.

Vaktar- og Bjargingartænastan fekk um midnáttina hóskvøldið fráboðan um, at Klevstrand var farin á land. Brimil fór í Vestmannasund og var hjá skipinum, meðan tað stóð uppi í fjøruni.

Tá fullfløtt var aftur um hálvgum níggju tíðina fríggjamorgunin, flotnaði Klevstrand avaftur, fylgdist síðan við Brimli og á Vestmanna.

Vagthavandi á Vaktar- og Bjargingartænastuni sigur við Sosialin, at ein riva er komin í ein barlasttanga frammi á skipinum, og ivaleyst verður kravt, at skaðin verður umvældur, áðrenn skipið fer aftur í millumlandasigling.

Veðrið var gott í Vestmannasundi, meðan skipið stóð á landi, og eingin vandi var nakrantíð fyri skipi ella manning.

Eindargjaldið á stovnunum:

# Skoðbráðið ov stutt

**Býráðið í Havn gjørdi í fjør av, at fyrsta januar í ár, skuldu foreldur í kommununi yvir ein kamb gjalda sama gjald fyri ansingarpláss. Gjaldið er tað sama fyri øll, tó kostar tað eitt sindur meira at hava eitt barn í vøggustovu enn í barnagarði. Men av tí at ymsar fortreytir eru fyri stovnarnar hevur hetta við sær, at vøggustovurnar ikki eru so væl fyri undir nýggju skipanini**

EINDARGJALD
*Ingrid Bjarnastein*



*Katrin Bjarnadóttir, leiðari á Vøggustovuni á Konmansmýru sigur, at skoðbráðið viðvíkjandi eindargjaldinum var í stytra lagi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Vøggustovurnar eru tær, sum eru harðast raktar, sigur Katrin Bjarnadóttir, leiðari á Vøggustovuni á Konmansmýru.

Stovnarnir eru ymiskt skipaðir. Til hvønn stovnin hevur tú eina normering um, hvussu nógv arbeiðsfólk skulu vera. Eitt nú eru fleiri arbeiðsfólk normerað til eina vøggustovu enn til ein barnagarð.

– Av tí at fíggjarveitingin frá kommununi er fyri hvørt barnið og gjaldið fyri hvørt barnið ikki er nóg høgt, so sigur tað seg sjálvt, at tá ein stovnur við fleiri arbeiðsfólkum pr. barn hevur minni pening til sjálvan raksturin, tá lønirnar eru trektar frá, greiðir Katrin Bjarnadóttir frá.

Katrin leggur dent á, at vøggustovan als ikki er ímóti eindargjaldinum. Tað hon kanska heldur fílist eitt sindur inn á er, at skoðbráðið at tillaga seg var eitt sindur ov stutt, og stovnarnir hava tískil ikki nátt at gjørt tær neyðugu tillagingarnar.

## Verri fyri

Tað kann tykjast sum um býráðsumsitingin kanska ikki hevur tikið hædd fyri øllum, ið takast skal hædd fyri, tá eindargjaldið varð ásett. Spurningar sum hvørjum lønarstiga pedagogarnir eru á og vasking hóska ikki rættiliga saman við gjaldið.

– Vit her uppi á Konmansmýru hava fleiri pedagogar á síðsta lønarstiga, og fáa teir tí meira í løn enn pedagogar, sum ikki hava arbeitt so leingi. Gjaldið fyri vasking í vøggustovu er pr. barn, og kravt er at gólvvíddin í vøggustovuni skal verða størri enn gólvvíddin í barnagarði. Hetta er nakað til dømis nakað, ið hædd ikki er tikin fyri.

Vøggustovan á Konmansmýru hevur eftir verandi skipan til dømis ikki ráð til avloysarar til stytri sjúkralegur.

– Tær longru sjúkralegurnar klára vit, tí tað fáa vit endurgoldið frá kommununi, men um sjúkralegan er stutt, hava vit ikki ráð til tess. Vit eru skipað sum ein stovnur, og tað vil siga, at vit gjalda millum annað fyri bókhald, olju og streym, og tað ger at hesir pengarnir verða skornir burtur onkra aðrastaðni.

Katrin Bjarnadóttir sigur, at eindargjaldið í sær er fínt. Tað setur krøv til stovnin at gera røttu prioriteringarnar.

# Halda fast við eindargjaldið

**Jan Christiansen, borgarstjóri sigur, at hildið verður fast við eindargjaldið. Ongin munur skal vera á gjaldinum til ansingarplássum**

EINDARGJALD
*Ingrid Bjarnastein*

– Tað kann vera, at tað er ein lítil munur á onkrum stovnum her og har. Hetta hevur við sær, at hjá onkrum stovnum kann tað verða ein lætti, og onkrir stovnar koma at svíða fyri tað. Men hetta er bert ein spurningur um tilvenjing hjá teimum ymsu stovnunum. Kanska tað kann verða eitt sindur tungt ta fyrstu tíðina, men stovnarnir venja seg við tað so við og við, sigur Jan Christiansen.

Eindargjaldið er roknað út frá miðalrakstrakostnaðinum hjá øllum stovnunum í kommununi. Og heldur Jan Christiansen, at hædd er tikin fyri øllum tí, sum neyðugt er.

– At vit hava ásett eitt eindargjald merkir ikki tað, at hetta er eitt sparitiltak frá býráðsins síðu. Eindargjaldið er ásett, so vit kunnu nærkast málinum, sum er 100% barnaansing í kommununi. Vit halda, at tað er fult ráðiligt at seta eitt eindargjald, tá barnaansingin og tær neyðugu fortreytirnar eru í lagi, sigur borgarstjórin.



*Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at hildið verður fast um eindargjaldið*

# Lær at siga frá

**Í heyst vitjar danski kreppu- og familjuterapeuturin, Kirsten Rudbeck í Føroyum. Hon fer at hava skeið í samskifti**

SKEIÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Skeiðið gongur út uppá, hvussu tú uppbyggir sjálvsvirði títt og hevur tað eisini nógv við assertivan atburð at gera. Tað er ætlað fólkum, sum arbeiða við ungum, og sum eru í einum ungum umhvørvi. Meiningin er at læra betri samskifti soleiðis, at tú kanst læra tey ungu at siga frá, siga nei, uttan at tey kenna seg kroyst til at gera tað øvugta.

– Tey ungu skulu læra at seta grensur, sigur Ólavur Grot, skeiðfyriskipari. – Hetta fyri, at tey ikki skulu enda í misnýtslu.

Kirsten Rudbeck hevur arbeitt nógv við hesum, og hevur hon hildið tílík skeið í Danmark. Sum lærarar hevur hon havt millum annað donsku Marianne Davidsen-Nielsen, og eisini vælkenda assertiónsvenjaran, Anne Dickson úr Onglandi.

Ólavur Grot hevur sjálvur tikið hetta skeiðið í Danmark, og er hann av sínum eintingum farin undir at skipa fyri hesum skeiði í Føroyum. Hann heldur, at tørvur er á tí her heima.

– Ætlanin er, at læra tey, ið arbeiða saman við teimum ungu at samskifta við tey á rættan hátt, soleiðis at tey ungu læra at seta markið. Misnýtslan í Føroyum er størri enn vit halda, og tað er týdningarmikið, at vit byrja at læra tey ungu at siga nei til rúsandi evnir longu frá barnsbeini av, sigur Ólavur Grot. Ólavur Grot hevur útbúgving innan misnýtslu, serliga stoffum og alkoholi. Hann hevur arbeitt í Danmark og USA við misnýtarum, og hann sigur, at alt, sum oftast botnar í, at misnýtararnir hava ov lágt sjálvsvirði.

Skipað verður fyri tveimum skeiðum. Tey eru skipað í tveimum. Fyrst eru tveir dagar, har tú lærir at samskifta greitt við onnur, og eisini er rolluspæl á skránni. Síðani kemur tú aftur tríggjar vikur seinni. Tær tríggjar vikurnar fært tú ymsar venjingar, sum tú skalt gera, og tá skeiðið endar tríggjar vikur seinni, fært tú restina setta uppá pláss. Tað verið seg, at Kirsten Rudbeck kemur at rætta uppá tað, ið er at rætta uppá, og annars fær tú restina avpussaða. Skeiðini verða í oktober og november mánaða. Annað skeiðið er ætlað leiðarum. Tá verður hugsað um dagstovnar, lærarar og onnur. Hitt skeiðið verður fyri arbeiðsfelagum. (Sí lýsing aðrastaðni í blaðnum)